## Nýstovnaða Ferðavinnufelagið skipað nevnd

Nevndin í nýstovnaða Ferðavinnufelagnum hevur nú skipað seg við Ásu Johnsdóttir sum forkvinnu og Fríðun Jacobsen sum næstformanni. Ferðavinnufelagið hevði stovnandi aðalfund 31. oktober og nevndin skipaði seg á fyrsta nevndarfundinum, ið varð hildin 3. desember. Umframt Ásu og Fríðun, ið starvast hjá ávikavist Hotel Hafnia og Green Gate Incoming, eru hinir nevndarlimirnir Jákup Sverri Kassi (Smyril Line), Henny á Líknagøtu (Atlantsflog) og Magni Blástein (Fiskiferðir). Eitt av málunum hjá Ferðavinnufelagnum er at fáa fleiri og betri hagtøl til vegar. Hetta fellur væl saman við, at SamVit nú ferð undir eina verkætlan, ið skal tryggja betri innsavnan av hagtølum í ferðavinnuni. Ein bólkur skal setast til at fyrireika hesa verkætlan og hevur Ferðavinnufelagið valt Jákup Sverra Kass at umboða seg í hesum arbeiði, sigur Vinnuhúsið.



# Føroyar kjarnuøki hjá

**Norski oljurisin StatoilHydro setir nú síni sjónligu fingramerki á føroyska landakortið. Við stórum fetum setir hesin oljurisin nú kósina longur norðureftir og nærkast heimaliga umhvørvinum, markinum millum Føroyar og Noreg. Stjórin heldur økini í ein landnyrðing úr Føroyum vera sera áhugaverd og fegnast um, at teirra umsókn varð gingin á møti**



*Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, og Rúni M. Hansen, stjóri í StatoilHydro, fegnast um úrslitið av triðju útbjóðing*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**3. ÚTBJÓÐING**

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað vóru fleiri glað andlit í Tinganesi mánamorgunin. Eitt teirra var fuglfirðingurin, Rúni M. Hansen, stjóri í StatoilHydro Føroyar og ein av deildarleiðarunum hjá stórfyritøkuni, tá talan er um leiting í altjóða høpi.

StatoilHydro er fyristøðufelag í bólki, har bara norðurlendsk oljufeløg eru við. Tey eru danska DONG og føroysku feløgini, Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Samtakið fekk tillutað ein risastóran bita av føroyska landgrunninum í nýggjastu útbjóðingini.

- Vit hava aftur fingið eitt gott og stórt leitiøki í Føroyum, og tað halda vit er sera positivt sigur Rúni M. Hansen, sum heldur, at Jarðfeingi og Vinnumálaráðið hava gjørt eitt gott arbeiði í sambandi við útbjóðingina.

*- Men er hetta ikki eitt óvanliga stórt øki tit hava fingið tillutað?*

- Tað sigur kanska heldur, hvussu stórt Føroyaøkið veruliga er. Tað er sera lítið gjørt á hesum økinum, sjálvt um vit hava verið her í nógv ár. Vit halda, at her er meira at fara eftir.

### Positivt fyri báðar partar

*- Hvat er tað, sum ger, at Føroya landsstýri skal lata einum samtaki eitt so stórt øki til leiting?*

- Eg kann ikki svara vegna landssstýrið men bara siga, at vit eru sera fegnir um at hava fingið hetta økið. Eg gangi út frá, at landsstýrið hevur mett tað vera skilagott at lata eitt so stórt øki, tí vit skulu gera nógvar seismiskar kanningar í hesum økinum, ið sum heild er sera lítið kannað. Tað vænti eg verður positivt fyri báðar partar.

*- Hví fara tit so langt norður eftir, tá vit vita, at verandi leiting liggur væl longur syðri, eisini í bretskum øki?*

- Í 1. útbjóðing vóru vit heilt har suðuri, í tí næstu lógu vit meira í miðjuni millum 1. og 3. útbjóðing, men vit halda, at tað er vorðið meira og meira áhugavert tess longur norðureftir vit flyta okkum. Tað síggja vit eisini hinumegin markið, har vit eru við í Rosebankøkinum, sum eisini er væl norðari enn økini vit fóru eftir í byrjan. Tí halda vit eisini, at tað er vert at kanna hesi norðaru økini enn meira.

*- Men hetta er jú nærsagt úti á "preriuni", í ongamannalandi, har eingin hevur gjørt kanningar fyrr. Tað má vera okkurt serligt, sum dregur tykkum so langt norður í ókent land?*

- Vit hava eitt sindur av vitan um økið, frá seismikki, og tað er hon, sum er drívmegin til at fara víðari. Hví ikki kanna økið nærri, tí tað kann blíva áhugavert í framtíðini. Tí hava vit lagt okkum á tað.

*- Tað er so langt norðuri, at tit nærkast markinum móti Noregi!*

- Ja, Statoil er væl kent í Noregi og í Norðsjónum annars. Og tað er kanska tí tað er Statoil, sum hevur eyguni eftir hesum økinum. Men orsøkin er tann, at vit vilja kanna hetta økið nærri.

*- Onkur jarðfrøðingur hevur sagt við Sosialin, at tað er upp móti norska markinum, at oljan ella gassið finnast?*

- Tað fer tíðin at vísa.

### Raðfesta ymiskt

Rúni M. Hansen vísir á, at Statoil arbeiðir kring allan heimin. Felagið er virkið í 40 londum. Føroyar er eitt av teimum londum, har Statoil hevur brúkt rættiliga fitt av peningi til leiting. Tí vóna tey eisini, at tað fer at gjalda seg aftur einaferð.

*- Hvussu ber til, at tit raðfesta hetta økið høgt, tá onnur stór oljufeløg sum BP og Shell eru við at taka følihornini til sín?*

- Tað er ein gongd vit síggja allastaðni, at onkur feløg eru meira virkin eina staðni og minni eina aðrastaðni. Tað er rættiliga vanligt í einum øki, har man ikki hevur funnið olju í rakstrarverdugum nøgdum, men vit halda framvegis, at




*Norðurlendskt oljusamtak leitar norðureftir. Loyvið 016, reyði liturin longst norðuri, er ókent leitiøki, sum nú verður kannað*

*Kelda: Jarðfeingi*